gult4 cyan4 magenta4 svart4

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Løgtingsins umboðsmaður flytur inn

INNFLYTING
*Stefan í Skorini*

Joen H. Andreasen, sum verður Løgtingsins umboðsmaður, hevur fingið arbeiðshøli, har hann skal halda til komandi tíðina.

Arbeiðshøli hansara verða í Niels Finsensgøtu 37 í gamla Fossbankanum. Umframt Løtingsins umboðsmann heldur Realkreditstovnur Føroya eisini til í gamla Fossbankanum.

Í sambandi við at Løgtingsins umboðsmaður fer undir virksemi sítt, verður móttøka hildin fyri innbodnum í hølunum í Niels Finsensgøtu tann 1. mai, har høvi verður at síggja hølini.

# Frelsunarherurin havt vitjan úr Noregi

TRÚÐARLÍV
*Stefan í Skorini*

Um páskirnar hevði Frelsunarherurin í Føroyum vitjan av majorunum Ada Cecilie og Thorbjørn Vang. Hjúnini eru væl kend í Føroyum og hava starvast bæði í Frelsunarherinum í Vági og í Tórshavn. Tey eru nú bæði farin frá eftir at hava verið í evangeliskari tænastu í 30 ár. Tey hava fyri tað mesta starvast í Noregi.




*Majorarnir Ada Cecilie og Thorbjørn Vang vóru í Føroyum og luttóku á páskastevnu Frelsunarhersins um páskirnar*

Majorarnir Ada og Thorbjørn Vang vóruí Føroyum í sambandi við páskastevnu Frelsunarhersins, sum var í Havnini 12.-16. apríl. Hjúnini leiddu hesi møtini, men vitjaðu eisini suðuri í Vági, har tey hava virkað fyrr.

Hóast tey eru farin frá vegna aldur, hjálpa tey javnan føroyinginum Njáli Djurhuus í arbeiðnum millum heimleys í Oslo. Eisini taka tey lut í øðrum evangeliskum arbeiði í Noregi.


Fyri fyrstu ferð í Føroyum




Fleirfalda ferðina á internetinum..!

**Við sn@rNET hjá Føroya Tele kanst tú ferðast á internetinum við rúkandi ferð alt samdøgrið.**

sn@rNET PRIVAT

| Downstream | Upstream | Stovningargjald | Mánaðargjald |
|---|---|---|---|
| 256kbps | 64kbps | 3.995,- | 449,- |
| 512kbps | 128kbps | 3.995,- | 649,- |

*Dátamongdir verða avroknað við 1,50 kr. fyri hvørt megabýt fyri útland og 0,50 kr. fyri hvørt megabýt fyri innanlands dáta. Prísirnir eru við MVG.*

sn@rNET VINNULIGT

| Downstream | Upstream | Stovningargjald | Mánaðargjald |
|---|---|---|---|
| 256kbps | 256kbps | 9.996,- | 1.545,- |
| 512kbps | 512kbps | 9.996,- | 1.396,- |
| 1024kbps | 512kbps | 9.996,- | 1.716,- |

*Dáta verða avroknað við 0,80 kr. fyri hvørt megabýt. Prísirnir eru uttan MVG.*

Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu, ið kallast sn@rNET. Hetta er eitt fast samband bygt á ADSL tøknina, ið gevur tær eina móttøkuferð upp til 1024 k/sek*), har tað vanliga uppringda sambandið, vit kenna í dag, bert kann móttaka og senda upplýsingar við eini ferð millum 28 og 56 k/sek. Umframt skjótu ferðina eru eisini hópin av fyrimunum og nýggjum møguleikum við tænastuni.

Vilt tú vita meira um sn@rNET, er tú vælkomin inn í eina av Telebúðunum eftir einum faldara ella vitja okkara heimasíða á www.tele.fo.

*) Galdandi fyri virki. Fyri privat kann hægsta móttøkuferðin vera 512 kb/sek. **Avmarkingar:** Av tí at ADSL-tøknin setur stór krøv til telefonlinjuna, eru avmarkingar fyri, hvar Føroya Tele kann veita sn@rNET.

FØROYATELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*

Føroya Tele • Postboks 27 • 110 Tórshavn • Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • e-mail: ft@ft.fo • www.tele.fo

petur & petur • 320870


# Útvarpsgjaldið skal rindast

**Maðurin, ið ikki vil rinda útvarpsgjaldið, tí hann sigur seg ikki hoyra Útvarp Føroya nóg væl, hevur fingið greið boð frá rættinum um at gjalda. Maðurin sigur seg fara víðari í rættin við málinum**

ÚTVARPSGJALD
*Stefan í Skorini*

– Eg fari framhaldandi at stríðast fyri hesum málinum, og eg ætli mær ikki at gjalda fult útvarpsgjald, so leingi eg ikki hoyri Útvarp Føroya, sigur Sigurd Johannesen.

Sigurd fekk á stuttum rættarfundi hósdagin boð um at gjalda útvarpsgjaldið. Dómarin segði seg ikki kunna fyrihalda seg til, at Sigurd sigur seg ikki hoyra útvarpið, men at dómarin má syrgja fyri, at lógin verður hildin.

Sigurd sigur, at hann fekk at vita frá rættinum, at um hann ikki rindar útvarpsgjaldið, so kann Útvarp Føroya taka pant í húsunum hjá honum.

Hóast hesar hóttanir hevur hann tó ongar ætlanir um at gjalda í bræði.

– Eg fari ikki at gevast við hesum málinum. Eg fari at stríðast til tann beiska enda, sigur Sigurd Johannesen.

Nú fer hann at gera vart við, at hann ikki hevur í hyggju at gjalda útvarpinum peningin, og so verður málið væntandi tikið upp í Føroya Rætti.

Sigurd hevur ikki havt nakran sakførara at hjálpa sær enn, men hann fekk at vita í rættinum, at tað er sera torført at klára seg uttan ein sakkønan løgfrøðing. Enn hevur hann ikki tikið støðu til, um hann fer at søkja sær hjálp hjá sakførara.

Sigurd sigur seg ikki vera bangnan fyri at fara í geglið, um tað kemur so langt.



*Sigurd Johannesen vil ikki gjalda útvarpsgjaldið, tá hann ikki hoyrir Útvarp Føroya. Nú endar málið væntandi í Føroya Rætti*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



# Óli Breckmann krevur Føroyar á postkort

**Føroyski fólkatingslimurin Óli Breckmann hevur í brævi til danska mentamálaráðharran, Elsebeth Gerner Nielsen, heitt á hana um at syrgja fyri, at Føroyar eisini fáa umrøðu á altjóða Grand Prixnum, sum verður í Keypmannahavn 12. mai**



*Óli Breckmann heitir danska mentamálaráðharran um at lova Føroyum og Grønlandi við á postkortini, sum verða framleidd til Grand Prixið*

MELODI GRAND PRIX
*Stefan í Skorini*

Tann 12. mai í ár verða Danmark og Danmarks Radio vertir fyri altjóða tónleikakapping, sum verður hildin í Ítróttarparkini í Keypmannahavn. Í hesum sambandi framleiðir DR nøkur postkort, og tað er Danmarks Turistråd, sum stuðlar framleiðsluni av teimum 23 postkortunum.

Tað hevur fingið ilt í føroyingar og grønlendingar, at einki av postkortunum vísa myndir úr teimum báðum londunum, sum tó eru í danska ríkinum. DR hevur noktað ferðaráðunum í Føroyum og Grønlandi at sleppa við á hesi postkortini, sum skulu sendast undir kappingini.

Tónleikakappingin verður sjónvarpað kring allan heim, og væntandi fara milliardir av fólki at sita frammanfyri sjónvarpsskíggjan hetta kvøldið. Um allir partar av danska ríkinum vórðu umboðaðir á postkortunum, hevði tað givið hyggjarum eina betri mynd av Danmark, heldur Óli Breckmann. Í tí sambandi kann nevnast, at undir teimum Olympisku leikunum í Sydney í Australia seinasta summar, varð ein mynd av Gásadali nýtt á heimasíðuni hjá tí danska olympiska liðnum.

Óli Breckmann vísir á, at Føroyar og Grønland hava stórslignari nátturu av vísa enn Danmark, og tí hevði tað verið upplagt, at havt tey við í postkortunum. Eisini hevði tað verið við til at styrkt føroyska og grønlendska ferðavinnu, og harvið styrkt tann einstáttaða búskapin í Føroyum.

Formaður Fólkafloksins heitir á Elsebeth Gerner Nielsen um at gera alt fyri at geva Føroyum og Grønlandi henda einastandandi møguleikan at marknaðarføra sína ferðavinnu.

# Mánaðarroknskapir hjá landinum lagir á netið



*Karsten Hansen hevur gjørt av, at allir roknskapir hjá almennu fyrisitingini skulu leggjast út á alnetið*

**Framyvir verða mánaðarroknskapirnir hjá almennum stovnum lagdir út á alnetið, so at øll kunnu síggja , hvussu umsitingin húsast við skattaborgarans peningi**

ROKNSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Opinleiki er grundgevingin hjá Karsteni Hansen, landsstýrismanni við fíggjarmálum, fyri at almannakunngera teir mánaðarligu roknskapirnar hjá almennum stovnum. Almenna fyrisitingin verður framyvir meira opin av hesum tiltaki.

Eitt av endamálunum er, at nú skal hvør einstakur áhugabólkur kunna gera sær sínar egnu metingar av roknskapinum, sum fyrr bara hava verið lagdir fyri serfrøðingar at meta um.

Við hesum kunnu eitt nú tíðindafólk, lesandi, kommunur og politikarar gera sínar egnu metingar av støðuni og altíð vita á leið, hvussu búskaparstøðan er.

Mánaðarroknskapirnir verða almannakunngjørdir á heimasíðuni hjá gjaldstovuni 15. í øðrum mánaði eftir mánaðarlok. Adressan á heimasíðuni er www.gjaldstovan.fo.

Fíggjarmálastýrið metir, at størri tilvitan um landsbúskaparhaldið fer at seta politikarum størri krøv og skapar aðrar fortreytir.


Norrönu Harmoniku Fagnaður 2001

20.-22. august.

Luttøkufráboðan

Sollstur ☐ Bólkur ☐ Navn: ____________

Navn: ____________ Ljóðføri: ____________
Navn: ____________ Ljóðføri: ____________
Navn: ____________ Ljóðføri: ____________
Navn: ____________ Ljóðføri: ____________
Navn: ____________ Ljóðføri: ____________
Navn: ____________ Ljóðføri: ____________
Navn: ____________ Ljóðføri: ____________
Umboðs-m/k: ____________ Tlf.Heima: ____________
Bústaður: ____________ Tlf.arb.: ____________

Vit ynskja at spæla undirhaldstónleik í cocktailbarini ☐

Vit ynskja at spæla til dans í náttklubbanum ☐

Um ætlanin er at spæla í cocktailbarini, skal viðmerkjast her, hvønn sløgin stíl ætlanin er at spæla. Dømi: Latinamerikanskur, skotskur, føroyskur, Jularbo, Taube o.l.

Stílur: ____________

Fráboðanin um luttøku skal í seinasta lagi 01. juli 2001 sendast til:

Norröna Harmoniku Fagnaður
Postboks 1192 - FO 110 Tórshavn